WWW.SMYRIL-LINE.COM




Ferðirnar eru galdandi restina av vetrarsiglingarskeiðnum, t.v.s. til 29. apríl.

BERGEN-CRUISE



**BERGEN** – býurin millum tey sjey fjøllini. Lítandi oman yvir býin frá fjallinum Fløjen, spákandi niðri á bryggjuni fram við gomlu litríku timburhúsunum, ella hvar vit enn eru, so er Bergen ein sera vakur og hugtakandi býur. Havið hevur í øldir knýtt býin til umheimin og gjørt Bergen til ein miðdepil fyri samhandil og mentan.

**Fyri hvønn 1.260,-**

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari innan við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Bergen í dupultkamari við wc/bað.

Eykaprísur er fyri onnur kamarsløg





Mini-Cruise úr 600,-

HETLAND-CRUISE

MINI-CRUISE

**Loyv tær eina hugnaliga Mini-Cruise ferð við Norrönu**

**Prísirnir eru hesir:**

| | | |
|---|---|---|
| 4-koyggjukamar við wc/bað, innv. | kr. | 600,- |
| 4-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 700,- |
| 3-koyggjukamar við wc/bað, innv | kr. | 800,- |
| 3-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 900,- |
| 2-koyggjukamar við wc/bað, útv. | kr. | 1000,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm, Tórshavn-Bergen ella Tórshavn-Seyðisfjörður (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

Góð orkestur luttaka á øllum cruise-ferðum.

Farið verður av Havnini hóskvøld og komið verður til Lerwick fríggjamorgun kl 8.30. Í Hetlandi hevur tú uml. 2½ dag at hugna tær í. Farið verður avstað aftur sunnukvøld og komið verður á Havnina mánamorgun kl. 6.00.

**Fyri hvønn 1.500,-**

**Íroknað prísin er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari innan við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Hetlandi í dupultkamari við morgunmati.

Eykaprísur er fyri onnur kamarsløg

SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

# Matinè í Býráðshøllini

**Í dag klokkan 12 fara næmingar og lærarar frá Tónlistaskúlanum í Klaksvík at hava Matinè í Býráðshøllini**

MATINÈ

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 12 verður matiné í Býráðshøllini í Klaksvík.

Tey, sum spæla eru næmingar og lærar á Klaksvíkar Tònlistarskúla. Aftaná verður kaffi og saft at fáa.

Tey sum spæla, eru, Henrietta A. Poulsen, klaver, Eydna Dahl, tvørfloyta, Marita Hansen, tvørfloyta, Eiríkur Biskopstø, violin, Birgit Sivertsen, violin, Ranvá Isaksen, klaver, Pætur Gerðalíð, cello, Simona Bringsberg, cello, Erla Petersen, cello, Petra Gardar, cello og Erla Jacobsen, cello.



# Friðarligt kring alt landið

Løgreglustøðirnar boða allar frá einum friðarligum hósdegi og hósnátt. Tvær fráboðanir um eld vóru í Havnini, har eldur var í eini vaskimaskinu, og onkur var sovnaður frá eini grýtu.

Á løgreglustøðini í høvuðsstaðnum boða teir eisini frá, at norski línubáturin Urvaag varð tikin fyri ólógligan fiskiskap í føroyskum øki, men enn er málið ikki kannað nærri. Báturin kom inn fríggjamorgunin.

Løgreglan í Eysturoynni og løgreglan vesturi í Vágunum hevði onki at gera hósdagin og hósnáttina. Teir siga, at tað var púra friðarligt.

**hkm**

I·net BREIÐBAND

petur & petur • 320870

# Skjótari internet?

Bíleggið nú og sparið kr. 750,-*) í stovning



Prísir úr 280,- kr./mðr.

- Upp til 20 ferðir skjótari enn uppringt samband
- Støðugt fast samband
- Tosa og surfa samstundis - ikki neyðugt við eyka linju
- Fleiri upplivingar á alnetinum

**Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

FØROYA TELE

**) Treytað av at tú teknar I·net Breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 31. mai 2004. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*






# TEMA-dagur um íløgur

á Parnassinum á Hotel Hafnia mánakvøldið 5. apríl klokkan 19.30

Øll eru vælkomin.

Íløgufelagið TEMA Kapital bjóðar við hesum til fyrilestrar, spurningar og kjak um íløgur yvirhøvur og serliga nýggju íløgudeildina StockRate.

TEMA Kapital, áður Kaupthing Invest, hevur frammanundan fleiri deildir: Norrøn partabrøv, Lánsbrøv í donskum krónum og Íslendsk lánsbrøv. Nýggjasta deildin eitur StockRate, sum navnframi danin Bjarne Jensen stendur á odda fyri. Hann luttekur á TEMA-degnum.

57 ára gamli Bjarne Jensen er kendur sum bankaserfrøðingur, greinari, fyrilestrahaldari, partabrævaserfrøðingur, ráðgevi, varastjóri hjá Danske Bank og mangt annað. Hann leiðir nýggju StockRate-deildina, ið ger íløgur í partabrøv í stórum og tryggum fyritøkum.

StockRate heldur eyga við 25.000 partabrøvum í yvir 50 londum, sum valt verður út frá.

Skrá fyri TEMA-degnum:

- Framløga av íløgufelagnum TEMA Kapital
  *Wilhelm E. Petersen, formaður*
- Framløga av deildunum hjá TEMA Kapital
  *Peter Holm, stjóri í Kaupthing*
- Leikluturin hjá Føroya Sparikassa
  *Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassa*
- "Eitt lív við partabrøvum"
  *Bjarne Jensen, sum fer at tosa breitt um íløgur og kunnar um StockRate.*

Øll eru vælkomin.

TEMA KAPITAL

KAUPTHING

FØROYA SPARIKASSI